Bygnaðarlig viðurskifti undir fyrireiking av verkætlanini

Í sambandi við fyrireikingina av verkætlanini um bygging av nýggjum bygningi til Sjúklingahotellið í Keypmannahavn verður arbeitt við einum bygnaðarligum skipanarmyndli, sum skal tryggja greitt ábyrgdarbýti, fakliga samskipan og neyðuga framdrift í verkætlanini.

Skipanin er býtt í tríggjar ymiskar eindir: arbeiðsbólk, verkætlanarbólk og stýrisbólk.

Arbeiðsbólkurin hevur ábyrgd av dagliga fyrireikingararbeiðinum og tryggjar framdrift, samskifti við ráðgevarar og framleiðslu av tilfari. Í bólkinum eru persónar frá Sjúkrahúsverkinum – herundir eisini sjúklingahotellinum, Bygningsstyrelsen og høvuðsarbeiðstakaranum, sum hava kunnleika til verkætlanina og til viðkomandi fyrisitingarlig og rakstrarlig viðurskifti.

Verkætlanarbólkurin hittist javnan og virkar sum forum fyri støðulýsingar, fakliga umrøðu og samskipan. Har luttaka bæði umboð úr arbeiðsbólkinum og viðkomandi starvsfólk innan m.a. fíggjarviðurskifti, løgfrøði, KT og rakstur, eins og uttanhýsis fakfólk kunnu verða boðin við eftir tørvi. Bólkurin er mannaður við umboðum frá Heilsu- og orkumálaráðnum, Sjúkrahúsverkinum, Bygningsstyrelsen og høvuðsarbeiðstakaranum.

Stýrisbólkurin hevur yvirskipaðu strategisku ábyrgdina av verkætlanini. Bólkurin er mannaður við deildarstjóra í Heilsu- og orkumálaráðnum, forstjóra í Sjúkrahúsverkinum og verkætlanarleiðara í Bygningsstyrelsen. Stýrisbólkuriná setir karmar og kós fyri arbeiðinum og tekur avgerðir um týdningarmikil viðurskifti, herundir ressursur, fígging og tíðarætlanir.